## Vindmyllur órógva

Tað hóvar ikki bretsku verjuleiðsluni, at orkumyndugleikarnir hava ætlanir um at útbyggja vindorkuna í stórum, tí verjuleiðslan vil vera við, at vindmyllur órógva radararnar hjá verjuni. Alment sigur verjuleiðslan, at hon hevur einki ímóti vindorku, men at tað er neyðugt at hugsa seg um, áðrenn vindmyllurnar verða settar upp. Sum skilst kunnu vindmyllur gera, at radararnir hava truplari við at avdúka óviðkomandi flogfør.



## Klaksvíkar Havn nýggja heimasíðu

Síðstu tíðina hava umboð fyri Klaksvíkar Havn, Miðlan og Cre8 ment eina nýggja heimasíðuloysn fyri Klaksvíkar Havn. Burturúr arbeiðinum er komin ein dagførd kunning um havnarviðurskiftini, og sum tekur støði í alheimsgerðini. Teksturin er á enskum og hetta er tilvitað. Tað verður mett at verða av stórum týdningi at kunningin úteftir er á enskum máli. Harvið kunnu útlendsk ferðaskip og farmaskip, ið koma higar lættari fá viðkomandi kunning. Á síðuni síggjast m.a. myndir av Klaksvíkar havn, kort yvir atkomu og veðurlíkindini í Klaksvík. Tað er eisini ein tíðindabreddi á forsíðuni.

# Eingin kann gera tað perfekta



**Katrin Ottarsdóttir hevur ikki gjørt tann perfekta dokumentar-filmin við filminum ”Eingin kann gera tað perfekta” um myndahøggaran Hans Paula Olsen. Til tess vantar eitt neyvari fokus. Hinvegin fáa vit eitt forkunnugt innlit í listarligu strembanina eftir perfektiónini**

UMMÆLI
*Pætur Marjunarson Dahl*
*post@sosialurin.fo*

Við nýggja filminum, ”Eingin kann gera tað perfekta”, ið varð frumsýndur í farnu viku, setur Katrin Ottarsdóttir hol á eina spennandi dokumentar-triologi, har hon, við einum filmstóli á økslini, roynir at lýsa tilveruna hjá trimum ymiskum listarfólkum. Í ”Eingin kann gera tað perfekta” er tað føroyski myndahøggarin Hans Pauli Olsen, ið loyvir Katrini (og okkum øllum) at fáa eitt innlit í sítt familjulív og sín listaheim. Serliga er tað síðstnevndi heimur, ið filmurin fyriheldur seg mest til.

*- Ein standmynd skal ikki gerast liðug – man má steðga áðrenn, sigur myndahøggarin, Hans Pauli Olsen, í filminum*

### Handan listarliga tjaldið

Hans Pauli Olsen er listafólk við stóra L. Ongin ivi um tað. Og júst hesa sannroynd eydnast tað Katrin Ottarsdóttir at lýsa til fulnar. Vit sleppa at síggja, hvussu Hans Pauli Olsen arbeiðir sum menniskja og sum listafólk. Og meðan vit fylgja honum frá byrjan til enda í eini av hansara verkætlanum, fáa vit rættliga fitt av viðmerkingum, hugleiðingum og vanligum smápráti við á vegnum. Frá teimum høgt flúgvandi listarligu hugleiðingunum til tær mest banalu fíggjarligu viðmerkingarnar, verður ein heildarmynd sett fram av einum myndahøggara, ið hevur bæði beinini á jørðini. Í einum klippi hoyra vit Hans Paula tosa um inspirationskelduna hjá sær, Rodin, og um sínar royndir við abstraktari list. Í næsta klippi kjakast hann dúgliga við konu sína (Hjørdis Haack), um hvussu óførur hann er at dustsúgva ella ei. Vit síggja tað drúgva og nágreiniliga arbeiðið við eini standmynd, har ein uppslúktur og fokuseraður Hans Pauli kelar fyri tí minstu detaljuni, og løtu aftaná, síggja vit hann og ein flytimann royna at rokna út, hvussu hann skal fáa allar sínar standmyndir inn í ein kontainara. Við øðrum orðum verður tú boðin inn handan tjaldið, har tey vanligu gerandistingini viga minst líka nógv, sum tað listarliga.

### Mótsøgnin

Hetta samspælið millum listina og gerandisdagin gevur hyggjaranum ein forkunnugan møguleika at síggja mótsetningarnar og komplementær-elementini innan listina, eitt nú millum form og innihald; surrealismu og realismu og ikki minst ímillum idealismuna og tað ítøkiliga skapið. Serliga hetta síðsta er eitt afturvendandi evni hjá Hans Paula, og samstundis eisini tað, ið heitið á filminum sipar til – at gera tað perfekta. Tað er ein sonn fragd at síggja og hoyra, hvussu Hans Pauli forklárar og lýsir sítt megin ”paradoks” (um man kann kalla tað tað?). Hans Pauli játtar seg til realismu, men samstundis noktar hann at geva sína standmynd til eina reina endurspeling av veruleikanum. Standmyndin skal ikki verða ein perfekt eftirlíkning. Sum hann sjálvur tekur til, ”hon skal ikki gerast liðug, man skal stegða áðrenn”. Og so - nakrar minuttir aftaná hoyrir man Hans Paula paradoksalt siga, ”nú er hon liðug!”.

Ein tann mest áhugverdi parturin er í byrjani á filminum, tá Hans Pauli er í ferð við at seta upp til eina fernisering. Hann stendur ikki og stjórnar onnur arbeiðsfólk aftur og fram, sum tann stereotypiski listarmaðurin ”eigur” at gera. Nei, Hans Pauli stendur við uppsmoygdum ermum og og sveitta á pannuni og forklárar púra róliga, hvussu einføld hansara list

*Tvídrátturin millum idealismu og ítøkiliga listarliga skapið rennur sum ein reyður tráður gjøgnum filmin*